# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jógvan I. Olsen 75

Fríggjadagin 8. juli fylti ein kendur toftamaður 75 ár. Tað er Jógvan Ingvard Olsen, fyrrverandi politikari og vinnulívsmaður.

Áhugan fyri politikki mundi hann fyrst og fremst fáa frá pápanum Jens Christian Olsen. Hann var tingmaður fyri Sambandsflokkinum í 20 ár í tíðarskeiðnum frá 1945-63, tá hann doyði, bert 62 ára gamal. Mamman var Helena Johannesen úr Hvalvík.



Jógvan tók skiparaprógv í 1953 og longdina í 1954. Hann var fiskiskipari frá 1946, og frá 1968 var hann skipari og reiðari. Hann fekst eisini við landbúnað og róði út.

Í 1966 gjørdi hann av at fara politiska vegin og stillaði upp fyri Sambandsflokkin í Eysturoy, men ta ferðina fekk flokkurin bar ein mann, og tað var tann royndi politikarin Jóhan Poulsen av Strondum. Í 1970 stillaði Jóhan Poulsen ikki uppaftur, og Sambandsflokkurin fekk tveir mans í Eysturoynni, Jógvan I. Olsen á Toftum og Jóhannus Martin Olsen á Strondum.

Heili 28 ár út í eitt var Jógvan Olsen løgtingsmaður, til hann ikki stillaði uppaftur í 1998. Sum rímiligt er, var tað serliga fiskivinnan, sum hevði hansara áhuga á Tingi. Hann var mestsum fastur limur í Fiskivinnunevndini og nevndarformaður í nøkur ár. Í 1989 tók hann við sum landsstýrismaður, og tá hevði hann fiskivinnumál um hendi. Hann sat í hesum starvi í tvey ár, til val varð útskrivað í ótíð.

Jógvan Olsen hevur havt so mong álitisstørv. Hann var bygdaráðslimur í Nes Kommunu frá 1974-80, harav formaður í 4 ár. Eisini var hann formaður í Lønjavningargrunninum í 7 ár frá 1981, í umboðsráðnum hjá Tryggingini í nøkur ár, og hann umboðaði Løgtingið í Norðurlandaráðnum 1991-93.

Hann var spakur tingmaður, gjørdi ikki nógvan háva burtur úr sær, og hann dugdi óføra væl at taka til, eisini skemtiliga. Tingstarvið varð verandi í familjuni, hóast hann gavst, tí á valinum í 1998 og síðani hevur hálvbróðir hansara Alfred Olsen umboðað Sambandsflokkin í Eysturoy.

Jógvan er giftur við Sólgerð Hansen av Nesi, og tey eiga fleiri børn.

Tað hevur ljóðað, at fleiri fráfarnir Sambandsmenn vóru farnir undir at skriva søgu Sambandsfloksins, men ongantíð er nakað komið út. Nú skal tað vera álvara, siga teir, tí næsta ár fyllir flokkurin 100 ár. Ein søgufrøðingur er settur at skriva, og ein ritstjórn hevur eftirlit við arbeiðinum. Jógvan Ingvard Olsen er limur í ritstjórnini.

## Føroyskir dagar í Ólavsvík

Ì sambandi við føroyskar dagar í Ólavsvík í Íslandi seinasta vikuskifti vóru bygdarráslimir úr Vestmanna kommunu bjóðaðir at verða við.

Vestmanna kommuna og Snæfellsbær kommuna eru vinarbýir.



*Kristinn Jónasson, borgarstjóri vm. saman við Øssi Christiansen frá Vestmanna kommunu*

Varaborgarstjórin Jón Mikkelsen, formaðurin í mentunarnevndini Pauli T. Petersen og formaðurin í trivnaðar & umhvørvisnevndini Øssur Christiansen við frúum vóru til føroysku dagarnar í Ólavsvík. Borgarstjórin Karl Olsen kundi ikki verða við á ferðini.

Heilt fitt av fólki var komið saman, tá varaborgarstjórin úr Vestmanna helt setanarrøðuna leygardagin. Við setanina sang Vestmanna Kirkjukór nakrar sangir og Havnar Dansifelag fór beint eftir hetta uppá gólv í saltfiskabygninginum í bygdini.

Sunnudagin vóru bygdarráðslimirnir ein rundtúr kring um í økinum, eitt nú til Hellisand og Rif, sum liggur um hálvan tíma uttan fyri Ólavsvík. Sunnumorgunin fór borgarstjórin við fylgi í kirkju, har Vestmanna kirkjukór sang til guðstænastuna.



*Varaborgarstjórin hm. her saman Pauli T.Petersen, formaður í Mentanarnevndini og øðrum*

**Dagurin 12. juli.**

**Heinrikur,** deyður í 1024. Týski keisarin Heinrikur II var giftur við Húngunn (deyð í 1003). Pávin Eugen III skírdi hann halgimenni í árinum 1146. Upprunaliga týskt navn, samansett av orðunum heim og ríkur.


# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra móðir, vermóðir, omma, langomma og systir okkara

**Jutta Heinesen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur.
Og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni frá kapellinum í kirkjuna og úr kirkjuni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til tykkum á deild A á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri góða umsorgan og hjálp.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sára og Sigrun**



†

Kunngjørt verður, at góði maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Poul Klein Johannesen**
Vestmanna

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn mikudagin 6. juli, 80 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju týsdagin kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Elsa,**
**Dagmar, Jóannes, Haldor og**
**Poul Erik við familju**

*Tey, ið vilja minnast Poul, kunnu lata eina gávu til Vestmanna kirkju, konto í Sparikassanum.*